

**BMW 320 D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SB 326 **Km:** 146.000
**Árgangur:** 01.06.2001
**Útgjald:** 38.750 **Mðr. gjald:** 3.834 (3 ár)

**kr. 155.000,-**



**SUZUKI GR. VITARA 2.5 BENSIN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** NA 753 **Km:** 48.000
**Árgangur:** 26.07.2005
**Útgjald:** 39.500 **Mðr. gjald:** 2.544 (5 ár)

**kr. 158.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 B 5D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HU 700 **Km:** 130.000
**Árgangur:** 06.10.2003
**Útgjald:** 28.750 **Mðr. gjald:** 2.870 (3 ár)

**kr. 115.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2.0 D-4D TERRA** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JK 958 **Km:** 90.000
**Árgangur:** 25.06.2003
**Útgjald:** 43.500 **Mðr. gjald:** 4.292 (3 ár)

**kr. 174.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2.0 D SOL 4H S/D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** RV 811 **Km:** 113.500
**Árgangur:** 03.12.2003
**Útgjald:** 46.250 **Mðr. gjald:** 2.968 (5 ár)

**kr. 185.000,-**



**TOYOTA RAV4 2.0 VVT-I 4X4** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JG 132 **Km:** 55.000
**Árgangur:** 03.02.2005
**Útgjald:** 58.750 **Mðr. gjald:** 3.744 (5 ár)

**kr. 235.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.4 LUNA B D-4D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SF 673 **Km:** 88.209
**Árgangur:** 19.05.2005
**Útgjald:** 41.250 **Mðr. gjald:** 2.647 (5 ár)

**kr. 165.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 H/B AUT.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JH 264 **Km:** 117.878
**Árgangur:** 10.06.2002
**Útgjald:** 27.000 **Mðr. gjald:** 2.701 (3 ár)

**kr. 108.000,-**



**COROLLA 2.0 LINEA TERRA D-4D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HE 038 **Km:** 217.000
**Árgangur:** 07.08.2002
**Útgjald:** 21.250 **Mðr. gjald:** 2.151 (3 ár)

**kr. 85.000,-**



**SUBARU LEGACY 2.0 AUT.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** AD 873 **Km:** 100.000
**Árgangur:** 09.03.2006
**Útgjald:** 49.500 **Mðr. gjald:** 3.172 (5 ár)

**kr. 198.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Matprísir falla nógv

**Um tað kemur hendavegin, kunnu vit bara vóna, men í Danmark falla prísirnir á matvørum rættiliga nógv í løtuni**

INNKEYP
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Altjóða fíggjarkreppan hevur eisini eina jaliga síðu. Olju- og bensinprísirnir eru falnir, og nú fellur eisini prísurin á matvørum. Í øllum førum í Danmark. Hetta vísir eitt yvirlit, sum "Fødevareøkonomisk Instritut" hevur gjørt fyri danska blaðið B.T.

Henning Otte Hansen, sum hevur staðið á odda fyri kanningini, staðfestir, at prísurin á dagligum vørum er fallin 8-10 prosent, og at hetta svarar til einar 5.000 krónur fyri eina familju við tveimum børnum.

- Matvørukreppan er næstan burtur, og hækkandi prísirnir á korni, sum komu í fjør, eru á veg niðureftir aftur, sigur Henning Otte Hansen við BT.

Júst kornprísirnir hava stóra ávirkan á útsøluprísin, tí korn verður nógv nýtt í framleiðslu av húsdjóraføði og til mjøl og breyð. Tí vilja kornprísirnir ávirka prísirnar á mjólk, flogfenaði og eggum.

Leiðslan í Coop Danmark, sum eigur handilsketurnar Kvickly, Brugsen, Fakta og Irma, væntar eisini lægri prísir.

- Vit fara at krevja lægri innkeypsprísir frá teimum framleiðarum, sum selja okkum vørur, sigur kunningarstjórin í Coop, Jens Juul Nielsen við B.T.



*Prísfallið á dagligvørum í Danmark smittar vónandi av upp á prísirnar í Føroyum*

*Savnsmynd*